## Politikarar á ES-skeið

Christel Schaldemose, sum umboðar teir donsku Sosialdemokratarnar í Evropatinginum, heldur, at danskir fólkatingspolitikarar vita alt ov lítið um ES og serliga um Evropatingið. Við kringvarpið DR sigur Christel Schaldemose, at fleiri fólkatingslimir vita ikki so frægt sum, hvussu nógv fólk eru í Evropatinginum, ella hvussu tingið arbeiðir. Tí hevur hon nú skotið upp, at tað skal verða álagt fólkatingslimum at fara á skeið um ES og Evropatingið. Sambært DR taka fleiri fólkatingslimir undir við hugskotinum.



## Fyrsta ferðamannaskipið

81 ferðamannaskip hava boðað frá, at tey ætla sær at vitja í Reykjavík í summar. og tað fyrsta kemur í morgin. Tað eitur Seven Seas Voyager og er 42.000 tons til støddar. Tey størstu skipini, sum koma til Reykjavíkar í summar, eru Crown Princess og Emerald Princess, sum eru 113.000 tons hvørt. Tað best kenna er harafturímóti Queen Victoria, sum er umleið 90.000 tons stórt. Morgunblaðið skrivar, at tey størstu skipini eru um 300 metrar long. Seinasta summar vitjaðu 83 ferðamannaskip í Reykjavík. Við teimum vóru 59.308 ferðafólk, og sambært Morgunblaðnum er ferðafólkatalið á leið tað sama í ár.

# Paris stevnt KÍ fyri sáttmálabrot



**Tað skuldi verða so gott, men tað endaði ikki so væl, og nú hevur Tony Paris stevnt KÍ fyri sáttmálabrot og krevur meiri enn eina millión í mistari løn**

SÁTTMÁLABROT
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Á fyrireikandi rættarfundi í dag skuldi dómarin taka støðu til eitt krav frá advokatinum hjá KÍ, Jógvan Elias Winther Poulsen, um at saksøkjarin, Tony Paris, setur peningaliga trygd fyri sakarmálskostnaðinum.

*Tony Paris hevur ikki fingið nakað fulltíðarstarv síðani hann var uppsagdur sum venjari hjá KÍ*

Hetta er eitt krav, sum er vanligt at seta, tá saksøkjarin ikki býr í danska ríkinum, men tað er somuleiðis greitt, at hetta krav skal setast fram á fyrsta rættarfundi, og tað varð tað ikki.

Advokaturin hjá Tony Paris, Jens Wang, førdi eisini hetta fram á fyrireikandi rættarfundinum í morgun, og dómarin gav honum rætt og avvísti kravið frá advokatinum hjá KÍ.

Á rættarfundinum kom eisini fram, at Tony Paris er komin illa fyri av uppsøgnini. Tá hann fekk fýra ára sáttmálan við KÍ segði hann øll størv frá sær í USA, men uppsøgnin í úrtíð hevur gjørt, at hann nú stendur uttan arbeiði. Tað hevur nevniliga ikki eydnast honum at fáa nýtt fulltíðarstarv, og hann stendur nú við ongari sjúkratrygging, og tað er mest sum ein vanlukka í USA.

Uppsøgnin merkir eisini, at hansara CV nú hevur fingið ein álvarsligan blett, tí hann hevur ikki áður roynt at fingið eina uppsøgn.

So eisini fíggjarliga er Tony Paris illa fyri, og hann hevur tí gjørt av at stevna KÍ eftir írestandi løn fyri tíðarskeiðið, og tað kravið liggur oman fyri milliónina.

Advokaturin hjá KÍ hevði annars kravt, at Tony Paris stillaði eina trygd á 100.000 krónur fyri sakarmálskostnaðin, men tað kravið varð sum nevnt avvíst av rættinum.

Advokaturin hjá Tony Paris fær nú tríggjar vikur at leggja síni krøv fram, og eftir tað fær advokaturin hjá KÍ væntandi ein mánað ella so at svara í, so veruliga rættarmálið verður neyvan tikið upp fyrr enn um smáar tveir mánaðir.

Um so semja fæst í málinum, ella tað verður upp til dómaran at gera av, ber ikki til at meta um. Men hugsandi er, at saksøkjarin fær viðhald, og so er spurningurin, hvussu pengakassin hjá KÍ fer at klára eina slíka uppgávu.

Men fyribils sleppur Tony Paris so undan at stilla eina peningaliga trygd á 100.000 krónur.

# Nýtt kafeteria í Vágsbotni



*Byrjað er at seta element upp, og greitt er, at niðasta hædd skal hýsa einum kafeteria*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**- Vit fara helst at leiga allan bygningin út við undantaki av einum stórum fundarhøli, sigur Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum um nýggja bygningin hjá felagnum**

BYGGING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Bygningurin, har Karlsborg helt til, var so illa farin, at eigarin, sum er Fiskimannafelagið, gjørdi av at ríva hann niður og byggja nýggjan bygning í staðin fyri.

Arbeiðið at byggja nýggjan bygning er farið í gongd, og ætlanin er at nýggi bygningurin skal verða í fýra hæddum. Tað vil so siga í somu hædd, sum restin av lonini, men væl hægri enn gamli bygningurin var.

Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum, sigur, at meginparturin av nýggja bygninginum verður leigaður út.

- Avgjørt er, at tað verður ein kafe ella kafeteria á niðastu hædd. Henda er longu leigað út. Men helst verður eisini restin av nýggja bygninginum leigað út. Felagið hevur sum so nóg mikið av plássi, men vit kundu kanska brúkt eitt stórt fundarhøli við plássi til nógv fólk. Restin verður so leigað út, sigur Jan Højgaard.

Hann hevur ikki bygginguna um hendi sjálvur, men hann sigur, at ætlanin er at fáa arbeiðið frá hondini so skjótt sum tilber.

Framman undan er Kafe Vágsbotn í økinum, og sum skilst er ætlanin hjá bátafelagnum at byggja nýggjan bygning, og har hevur ljóðað, at niðasta hædd skal leigast út til eina írska pub. Hetta tykist eisini vera í tráð við ætlanina hjá býráðnum at gera Vágsbotn til eitt hungaligt umráði við pubbum og kafeum.

Nágreiniliga nær nýggi bygningurin hjá Fiskimannafelagnum skal standa liðugur er ikki púra greitt, men element verða nú sett upp, og tað er skjótur máti at byggja upp á.